90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos

# ESMAR EYSTUROY



MYND: ÁLVUR HARALDSEN

**FAKTA JÓGVAN HANSEN**

**Navn:** Esmar Eysturoy, Cand.adm.soc.
**Aldur:** 42
**Familja:** Ógiftur. Ókendan pápa. Einabarn. Andliga skildur við Schopenhauer, Focault og Habermas
**Starv:** Ráðgevandi analytikari í Miðfyrisitingini
**Bústaður:** Tórshavn

# Ov fáar **skúmbananir** í skúmparty

**Hvussu var skúmparty leygarkvøldið?**
Lat meg siga tað soleiðis, at har vóru ikki nógvar skúmbananir ...

**Hvørja styrki hava tínar brillur?**
Sikkin ein spurningur!

**Er tað ein lætti at hava valt sær tí einastu einu?**
Nei. Tað er bara stríð av tí. Men mítt image krevur tað.

## Hvat ynskir tú tær í brúdleyps-gávu?
At nógv fólk koma í brúdleypið í høllini á Hálsi annað páskakvøld!

**Angrar tú nakað í lívinum?**
Burdi havt gjørt meira við musikkin.

## Hvat ger teg lukkuligan?
Tá eg síggi meg sjálvan í sjónvarpinum.

**Hvønn eginleika hjá tær sjálvum er tú glaðast fyri?**
Míni analytisku evni.

**Hvørjar veikleikar hevur tú?**
Kanska onkur vildi hildið tað vera ein veikleika at eg ikki ordiliga dugi at fáa eyga á nakran veikleika ...

**Hvør tíð hevur verið tann besta í tínum lívi?**
Tá Føroyar vóru ein dekonstruktivistisk abstraktión og ein diskursiv diskussión, meðan veruleikin var Oyrasundsskollegiið, RUC, Føroyahúsið og Skarv.

**Er nakar persónur klókari enn tú í Føroyum?**
Sambært Quiztinum hjá Gunnari Nolsø gongur Ólavur Presley mær ein skarpan gang.

**Hvat heldur tú um sosialu karmarnar í føroyska samfelagnum?**
Reint teoretiskt eru teir útmerkaðir.

## Hvat hevur mamma tín at siga fyri teg?
Nokk ikki so nógv, sum eg havi at siga fyri hana.

**Hvat var besta lestrararbeiðið, tú hevði?**
Eg hevði bara eitt. Í brúksini. Tað var strævið.

## Pissar tú í svimjihylinum?
Sikkin ein spurningur.

**Hvat er títt motto?**
Javnstøðusnakkið plágar meg sum allar aðrar menn, men so hugsi eg, eitt sindur motto-kent: »Heldur eina kvinnuliga teori enn eina teoretiska kvinnu«. Tað er ikki kvinnuni sjálvari, men hennara teori, tað er galið við. Fá fyribrigdi eru betur í praksis enn í teoriini – men kvinnan er eitt teirra. Ja, hóast teoriin um kvinnuna er góð, og veruleikin kann vera ein pína, so er veruleikin betur kortini. Ið hvussu er reint teoretiskt. Tað var, í stuttum, henda analysan sum gjørdi, at eg fríggjaði og skal giftast.